# Bilurin er stongdur



Eigarin av hesum bilinum er iki ráðaleysur, hóast hurðalásið eftir øllum at døma ikki riggar, sum tað skal. Hann hevur gjørt sær sítt egna lás við ketu og heingilásið, og so verður hesin bilurin ikki stolin. Men hvør skuldi nú havt hug at stolið hann?

# Einki er sum eitt korter av sól



Veturin kann verða langur – ikki bert hjá okkum, men eisini aðrastaðni – og tá kann verða gott við onkrari løtu í solarium. Eitt er tó vist, hendan kvinnan fær ein heldur skiftandi lit, men kanska snýr tað seg bara um at halda hitan eina løtu.



# Trappurnar mangla

Her er okkurt, sum ikki gekk eftir ætlan í byggingini. Hvussu handan samansetingin við einum radiatori, hurð í leysum lofti og einum stóli riggar, kundi verið spennandi at fingið at vita.

# Í rangastrúpan

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***

**Og hvussu við øðrum førum**
Í hesum førinum vil eg siga, at tað ikki kemur an uppá støddina
Løgmaður á Rás2

**Hvussu við okkum øðrum?**
Summarið verður helst trupult fyri partabrævaeigarar
www.uf.fo

**Ferðafólkið á glið?**
Fráferðin mátti útsetast ein hálan tíma
Olivant

**Ymisk sløg av bóltum**
Hatta var ein flottur bóltur, hann lyfti innfyri har
3-2

**Tekur avleiðingarnar áðrenn nýggjan dyst**
Venjarin hjá Eysturríki hevur í kvøld boðað frá, at hann leggur frá sær beinanvegin
Olivant

**Forelskilsi?**
Ísland vil forða fyri, at fleiri ísbjarnir verða skotnar í Ísland
www.uf.fo

**Og teir vunnu álíkavæl!**
Føroysk hjálp til Spania
Olivant

**Tað er so einki prýði**
Loysir seg peningaliga at hava vindmyllu í urtagarðinum
www.uf.fo

**Nýggjur byggiharri?**
Yvirfriðingarnevndin ikki liðug við Eiði 2 fyrr enn seint í summar.
www.uf.fo

# Góðan morgun





Hesar báðar myndirnar eru tiknar í Vestmanna nú um dagarnar. Onkur hevur hildið tað verið stuttligt við morgungávu til eigaran av hesum bili - sum um bilurin í sær sjálvum ikki var nóg frískur.